# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hanna Davidson**, fødd Olsen, ættað úr Leirvík, búsitandi í Lysekil í Svøríki, andaðist mánadagin, 82 ára gomul.

**Anna Elisabeth Holm**, fødd Veihe, vanliga nevnd Lisa, ættað úr Porkeri, búsitandi í Helsingør, andaðist á Helsingør Sjúkrahúsi fríggjadagin 20. juni, 92 ára gomul. Jarðarferðin verður frá Helsingør kapell hósdagin klokkan 11.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Ingibjørg Nicolajsen**

andaðist og varð jarðað.
Takk til øll, sum stuðlaðu undir sjúkraleguni og gjørdu tíðina góða og lættari hjá mammu.
Takk til heimarøktina og palliativu deild á Landssjúkrahúsinum og serstakliga stóra tøkk til palliativa toymið fyri góða vegleiðing og dyggan stuðul gjøgnum alla sjúkraleguna.
Takk til prestarnar, organist, sangarar og kirkjutænarar og øll tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Havnar kirkju.
Takk til øll tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Árni, Per, Gunnvør og Did**




# Bilmekanikarar fingið prógv

Týsdagin 24. juni vóru tríggir bilmekanikaralæringar til próvtøku á Tekniska Skúlanum í Havn.

Teir vóru f.v.: Jákup Hansen, Klaksvík, og Johannus Simonsen, Fuglafjørður, sum báðir hava lært hjá Reyni Service í Klaksvík, og Martin Debes Nielsen, Tórshavn, sum hevur lært hjá Bilasøluni í Hoyvík.

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni

**Níggjunda árið á rað verður sunnudagin 6. juli skipað fyri minningardegi fyri tey sum eru deyð í ferðsluni. Dagurin verður sum vant hildin við, at blómur verða lagdar á tey støð, har ferðsluvanlukkur hava kravt mannalív**



*Sunnudagin 6. juli verður minningardagur teirra deyðu í ferðsluni 2008. Samskiparin av tiltakinum, Ingi Gunnarsson, sigur, at brúk er fyri fólki til at leggja blómur út í Eysturoynni og Suðuroynni og møgliga eisini í Vágum*

Sunnudagin 6. juli verður minningardagur teirra deyðu í ferðsluni 2008 hildin. Samskiparin av tiltakinum, Ingi Gunnarsson, sigur, at brúk er fyri fólki til at leggja blómur út til tey 183 støðini kring landið, har deyðsvanlukkur eru hendar, og honum teimun vantar fólk í Eysturoynni og Suðuroynni og møgliga eisini í Vágum. Ingi sigur, at tað hevði verið gott um fleiri kundu hjálp til við at leggja blómurnar út.

Endamálið við tiltakinum er at gera vart við, at tað framvegis henda alt ov nógvar álvarsligar vanlukkur í ferðsluni og at fáa okkum at steðga á eina løtu og hugsa um hesi viðurskifti.

Í hesum sambandi heitir Ráðið fyri Ferðslutrygd á fjølmiðlarnar um at taka hetta evnið upp og kasta ljós á hesi viðurskifti á ymsan hátt. Heitt verður eisini á kirkjur og samkomur um at taka evnið upp sunnudagin 6. juli. Síðan minningardagin í fjør hava vit mist 4 mannalív í ferðsluni.

Í sambandi við minningardagin verður eisini tøgn í ein minutt, áðrenn fótbóltsdystirnir í Formuladeildini byrja sunnudagin 6. juli.

Tey sum eru áhugað í at leggja blómur út eru vælkomin at ringja til Inga Gunnarsson á telefon 794652.

**Dagurin**
**26. juni. Pelagius**, deyður umleið ár 925. Ein 10 ár gamaldrongur, sum varð tikin av døgum, tá ið maurar ráddu í Spania.